# INNBJÓÐING at søkja um loyvi til oljuleiting

*í fyrsta føroyska útbjóðingarumfarinum*



OLJUMÁLASTÝRIÐ
MINISTRY OF PETROLEUM



**Eyðun Elttør** landsstýrismaður
í olju- og umhvørvismálum

# Vælkomin til fyrsta útbjóðingarumfar

Fyrsta útbjóðingarumfarið er ein týðandi leikur í langa talvinum um møgulig ráevni í føroysku undirgrundini.

Í triatiárunum var orðaskifti á løgtingi um undirgrundarmálið. Stutt eftir at heimastýrislógin varð samtykt, settu føroyskir myndugleikar fram ynski um at taka yvir ráevnini.

Í 1992 eydnaðist hetta umsíður, men góð sjey ár skuldu ganga, áðrenn klárt var at fara undir okkara fyrsta útbjóðingarumfar. Orsøkin til hetta er fyrst og fremst tann, at viðurskiftini viðvíkjandi landgrunsmarkinum millum Føroyar og Bretland ikki gjørdust greið fyrr enn við sáttmálanum, ið varð undirskrivaður 18. mai í fjør.

Tíðarskeiðið frá yvirtøkuni og til í fjør hevur kortini ikki verið til fánýtis, tí hesi árini góvu neyðuga skotbráið, ið føroyskum myndugleikum tørvaði at leggja til rættis eina komandi oljuvinnu. Nógv fyrireikingararbeiði er gjørt hesi árini, og kann eg serliga nevna frágreiðingarnar hjá oljuráðleggingarnevndini, løgtingslógina um kolvetnisvirksemi og ymisku forkanningarnar, sum síðani 1994 hava økt munandi um vitanina um føroysku undirgrundina.

Lógarkarmarnir eru nú sum heild fingnir uppá pláss. Men karmarnir skulu fyllast út, og verður arbeitt við kunngerðum um verju av umhvørvinum, trygdarviðurskifti v.m. Miðað verður eftir at fáa hesar kunngerðir settar í gildi sum skjótast, soleiðis at komandi loyvishavarar hava møguleika fyri at fremja leitingarætlanir á føroyska landgrunninum í 2001.

Vónandi verður nú staðfest, at føroyski landgrunnurin goymir oljuleiðir, ið tað loysir seg fíggjarliga at framleiða, og sum kunna verða við til at tryggja framtíðar ættarliðum í Føroyum góð livikor.

Umsøkjarar eiga at leggja sær í geyma, at Føroyar ætla sær meira enn bert at vera vertsland hjá altjóða oljuídnaðinum. Føroyskir myndugleikar og føroyska vinnulívið leggja dent á, at føroyingar og føroyskar fyritøkur fáa møguleika at taka lut í komandi oljuvirkseminum. Luttøka kann økja um førleikan í føroysku vinnuni, og sum frálíður skapa eitt sterkari og meira fjølbroytt føroyskt vinnulív. Føroyskir myndugleikar leggja somuleiðis dent á, at virksemið á landi ikki verður miðsavnað, men kemur øllum Føroyum til góðar.

Eg bjóði hesi nýggju vinnuni vælkomnari at virka á føroyska landgrunninum og í Føroyum sum heild. Gera allir partar sítt til at leggja vinnuna til rættis við virðing fyri náttúruni, umhvørvinum, føroysku mentanini og ikki minst fyri fiskivinnuni, kann oljuvinnan mennast á ein hátt, sum verður henni og øllum samfelagnum at gagni.

Tórshavn, februar 2000



# Lýsing eftir umsóknum um loyvi til oljuleiting

Sambært § 7, stk. 1 í løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi, hereftir nevnd kolvetnislógin, lýsir landsstýrismaðurin í oljumálum hervið eftir umsóknum um loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum á føroyska landgrunninum. Økini, sum verða boðin út, og almennu treytirnar, ið verða settar loyvishavarum, eru ásett í løgtingslóg nr. 5 frá 10. februar 2000, hereftir nevnd útbjóðingarlógin.

## 1. Umsøkjarar

Loyvi verða veitt føroyskum partafeløgum ella útlendskum feløgum við deild skrásettari í Føroyum. Partapeningurin hjá partafelagnum skal í minsta lagi vera DKK 1.000.000.

Feløg kunnu søkja um loyvi hvør sær ella saman. Í hesum skjali verður heitið "umsøkjari" eisini nýtt um samtøk av feløgum, sum søkja um loyvi saman.

Søkja fleiri feløg saman, skal ætlaða fyristøðufelagið upplýsast í umsóknini.

## 2. Útboðsøki

Hesir teigar á føroyska landgrunninum verða boðnir út, jvb. § 2 í útbjóðingarlógini:

6004/1, 2, 3, 4, 5, 6, 7, 8, 9, 11, 12, 13, 16 og 17
6005/2, 3, 4, 5, 7, 8, 9, 10, 12, 13, 14, 15, 17, 18, 19, 20, 22, 23, 24 og 25
6103/1, 2, 3, 4, 5, 6, 7, 8, 9, 11, 12, 13, 16, 17, 21 og 26
6104/7, 8, 9, 10, 12, 13, 14, 15, 16, 17, 18, 19, 20, 21, 22, 23, 24, 25, 26, 27, 28, 29 og 30
6105/20, 22, 23, 24, 25, 27, 28, 29 og 30.

Umsóknir um loyvi kunnu fevna um ein ella fleiri av omanfyri nevndu teigum og kunnu eisini fevna um partar av hesum teigum (leitimið og leitikervi).

## 3. Fortreytir fyri at fáa loyvi

Loyvi verða sambært § 6 í kolvetnislógini bert veitt umsøkjarum, sum hava neyðugan sakkunnleika, royndir, førleika og fíggjarorku. Tað er ein treyt fyri at fáa loyvi, at tað almenna fær innlit í og gagn av virkseminum.

Umsøkjarar skulu eisini hava neyðugan førleika í trygdar-, heilsu-, arbeiðsumhvørvis- og umhvørvisviðurskiftum umframt tilbúgvingarviðurskiftum.

Tað er ein treyt fyri at fáa loyvi, at virksemi loyvishavarans hevur fyrilit mótvegis fiskiskapi og verju av fiskastovnum. Tíðaravmarkingar fyri seismiskar kanningar v.m. eru prentaðar á baksíðuni.

## 4. Samráðingarevni

Almennu treytirnar fyri loyvini eru ásettar í útbjóðingarlógini við tilhoyrandi standardloyvi.

Oljumálastýrið fer við støði í uppskoti frá umsøkjarunum at samráðast um hesar serstøku treytir fyri einstøku loyvini:

a) Arbeiðsskránna fyri einstaka loyvið

b) Um leitiskeiðið skal vera antin:

- 6 ár, har ein arbeiðsskrá verður avtalað fyri alt leitiskeiðið, ella
- 9 ár, har ein arbeiðsskrá verður avtalað fyri tey fyrstu 3 árini.

Í loyvum við 9 ára leitiskeiði skal avtala gerast ikki seinni enn 4 mánaðir innan fyrstu trý árini eru farin um 1) eina nýggja arbeiðsskrá fyri eftirverandi 6 árini av leitiskeiðinum, og um 2) í hvønn mun og nær loyvishavarin skal lata øki frá sær. Oljumálastýrið fer við støði í uppskoti frá loyvishavaranum, at taka upp nýggjar samráðingar við loyvishavaran um hesi viðurskifti.

c) Viðurskifti, sum viðvíkja føroyskari luttøku í kolvetnisvirkseminum

Stórur dentur verður lagdur á at tryggja føroyska luttøku í kolvetnisvirkseminum. Hetta er partur av treytunum fyri loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum og fer at verða gjølliga viðgjørt í samráðingunum millum Oljumálastýrið og umsøkjararnar. Í hesum sambandi verður dentur lagdur á, at leitingar- og framleiðsluvirksemið eisini verður til gagns fyri útjaðaran.

## 5. Metingarstøði, tá loyvishavarar verða valdir

Fyri at tryggja, at føroyski landgrunnurin verður kannaður nágreiniliga og fyri at tryggja, at føroyskt vinnu-lív fær veruligar møguleikar at luttaka í kolvetnisvirkseminum, fer dentur at verða lagdur á niðanfyri nevndu viðurskifti, tá loyvi verða veitt:

a) Jarðfrøðiligu fatanina og arbeiðsskyldurnar, sum umsøkjarin vil átaka sær fyri gjølla at kortleggja olju-vánirnar og leita eftir kolvetnum á økinum, sum verður fevnt av loyvinum, herundir serliga um umsøkjarin vil átaka sær at gera leitiboringar. Í øðrum lagi, í hvønn mun umsøkjarin vil stuðla kanningum við atliti at framtíðar oljuleiting á Føroyaøkinum.

b) Á hvønn hátt og í hvønn mun umsøkjararnir vilja tryggja veruligar møguleikar fyri føroyskari luttøku í kolvetnisvirkseminum á føroyskum øki.

## 6. Umsókn

Í umsókníni skulu vera hesar upplýsingar í hesi raðfylgju:

a) Navn og bústaður umsøkjarans umframt navn og bústaður hjá tí persóni, sum umboðar umsøkjaran mótvegis myndugleikunum í Føroyum, meðan umsóknin verður viðgjørd.

b) Umsóknarøkið lýst við landafrøðiligum krosstølum og avmarkað við breiddar- og longdarstigum víst við heilum stigminuttum, og við ávísing til teigatøl sum omanfyri ásett.

Verður søkt um fleiri loyvi, skal ein raðfesting av ynskjum umsøkjarans vera í umsókníni.

Søkja fleiri í felag, skal upplýsast, hvussu stóran lut av loyvinum einstøku luttakararnir skulu hava (%), og ætlaða fyristøðufelagið skal upplýsast.

c) Uppskot um arbeiðsskyldurnar, ið umsøkjarin vil átaka sær fyri gjølla at kortleggja oljuvánirnar og leita eftir kolvetnum á umsóknarøkinum, og um tíðarætlanina fyri virkseminum, herundir um søkt verður um eitt 6 ára loyvi ella eitt 9 ára loyvi. Í øðrum lagi skal umsøkjarin skjóta upp, á hvønn hátt hann vil stuðla kanningum við atliti at framtíðar oljuleiting á Føroyaøkinum.

d) Uppskot um hvussu og í hvønn mun umsøkjarin vil tryggja veruligar møguleikar fyri føroyskari luttøku í kolvetnisvirkseminum, og hvussu virksemið kann gagna útjaðaranum.

e) Í fylgiskjali 1 skal vera ein samandráttur av umsókníni.

f) Í fylgiskjali 2 skal vera ein jarðfrøðilig meting av umsóknarøkinum.

g) Í fylgiskjali 3 skal vera ein fíggjarlig meting av leitimiðunum, sum umsóknin fevnir um.

h) Í fylgiskjali 4 skulu vera upplýsingar og uppskot í sambandi við føroyska luttøku í kolvetnis-virkseminum.

i) Í fylgiskjali 5 skulu vera partafelagsupplýsingar.

j) Í fylgiskjali 6 skulu vera upplýsingar um førleika og royndir umsøkjarans viðvíkjandi tøkni, trygd, arbeiðsumhvørvi og umhvørvi.

Oljumálastýrið skilar sær rætt til at krevja ískoytisupplýsingar.

Upplýsingarnar, sum verða givnar í umsókníni, herundir fylgiskjølunum, verða viðgjørdar í trúnaði, jvb. í hesum sambandi § 20 í standardloyvinum.

Umsóknir eiga í mesta lagi at vera 10 síður, fylgiskjøl ikki íroknað.

Umsøkjarar kunnu við at venda sær til Oljumálastýrið fáa:

1. hornakrosstølini fyri útboðsøkið.

2. leiðreglur fyri at gera omanfyri nevndu fylgiskjøl.

3. útbjóðingarlógina við viðmerkingum.

4. standardloyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum.

5. standard forkanningarloyvi.

Hesar upplýsingar eru eisini tøkar á heimasíðuni hjá Oljumálastýrinum (www.oms.fo).

Framhald, á næstu síðu

## 7. Ágáva

Fyri viðgerð av umsókn um loyvi verður kravd ágáva uppá DKK 100.000,-

Ágávan verður goldin Oljumálastýrinum kostnaðarfrítt á konto hjá Føroya Landsstýri: SWIFT to FIFBFOTX konto nr. 6460-2600058 (ref. FEE 102320-2520-0700-0100). Bústaður: Føroya Gjaldstova, Postsmoga 3, FO-110 Tórshavn, Føroyar. Avrit av kvittan fyri, at ágávan er goldin, skal vera hjáløgd umsóknini.

## 8. Ymiskt

Verður loyvi veitt fleiri feløgum saman, skal samstarvsavtala um tað av loyvinum fevnda virksemið gerast ikki seinni enn 90 dagar eftir, at loyvið er veitt. Landsstýrismaðurin kann krevja, at avtalan verður broytt í nærri ásettan mun, jvb. § 16 í standardloyvinum.

Innan 30 dagar eftir, at loyvið er veitt, skal loyvishavarin veita trygd fyri allar skyldur, sum liggja á honum sambært loyvinum. Landsstýrismaðurin skal góðkenna trygdina og kann krevja broytingar, jvb. § 25 í standardloyvinum.

Innan 3 mánaðir eftir, at loyvið er veitt, skal loyvishavarin leggja eina ætlan fyri landsstýrismannin til góðkenningar, um hvussu og hvar virksemið á landi verður skipað í leitingarskeiðnum, jvb.§ 15, stk. 2 í standardloyvinum.

Vart verður gjørt við, at fyristøðufeløg mugu rokna við at skula hava hóskandi útgerð til at ganga ímóti oljulekum eins og eina bjargingartyrlu í tilbúgving í Føroyum, meðan borivirksemi fer fram.

Sambært § 7, stk. 3 í kolvetnislógini kann landsstýrismaðurin lata vera við at ganga innkomnum umsóknum á møti.

Umsóknir um loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum skulu vera Oljumálastýrinum í hendi í seinasta lagi 17. mai 2000 kl. 12.00. Allar umsóknir, ið eru komnar inn fyri hesa tíðarfreist, eru at rokna sum komnar samstundis. Umsóknirnar skulu latast til:

Oljumálastýrið<br>
Postsmoga 1162<br>
FO-110 Tórshavn<br>
Føroyar

Umsóknirnar, herundir fylgiskjølini, kunnu vera á føroyskum ella enskum.

Umsøkjarin skal lata umsóknina við fylgiskjølum inn í trimum prentaðum eintøkum. Harumframt skal eitt elektroniskt avrit av samlaðu umsóknini latast inn á lesifløgu. Fløgan skal kunna lesast í einum vanligum teldufløguspælara. Elektroniska avritið skal lættliga kunna lesast inn í Microsoft Office 97. Fløgurnar og fløguhúsarnir skulu vera væl merktir.

Landsstýrismaðurin í oljumálum miðar eftir at veita loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum í september 2000.

### Tíðaravmarkingar fyri seismiska skjóting v.m.

Loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum sambært § 6 í løgtingslógini um kolvetnisvirksemi gevur loyvishavaranum rætt m.a. at gera forkanningar, herundir seismiskar kanningar, á økinum, ið loyvið fevnir um. Loyvishavaranum nýtist ikki serstakt forkanningarloyvi.

Tað er kortini ein treyt, at loyvishavarin fylgir reglunum, ið til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri forkanningarvirksemið. Viðkomandi reglur eru at finna í forkanningarloyvinum.

Vart verður gjørt við, at loyvishavarin í virksemi sínum skal sýna fyrilit mótvegis fiskiskapi og verju av fiskastovnunum.

Viðvíkjandi verju av fiskastovnum verður gjørt vart við, at økið, ið verður boðið út, er undir almennu regluni um, at einki seismiskt virksemi eigur at fara fram í tíðarskeiðnum frá 1. november til 15. apríl.

Viðvíkjandi fyriliti mótvegis fiskiskapi verður gjørt vart við, at meðan seismiskar kanningar verða gjørdar, hava loyvishavarar skyldu at taka fiskiveiðiumboð umborð á kanningarfarið. Víst verður í hesum sambandi til brot 6 í forkanningarloyvinum.

Viðvíkjandi leitiboringum verður gjørt vart við, at tað í løtuni ikki verða ásettar serligar tíðaravmarkingar í teigunum, ið verða boðnir út í 1. útbjóðingarumfari. Umhvørviskanningar, t.d. kanningar, ið landsstýrið setir í verk, ella kanningar í GEM høpi, kunnu føra til, at Oljumálastýrið seinni ásetir, at tað í ávísum teigum ikki má borast í oljuberandi fláum ávísar tíðir av árinum.

**ÚTBOÐSØKIÐ**




**OLJUMÁLASTÝRIÐ**
*MINISTRY OF PETROLEUM*


J.C. Svabosgøta 14, Postsmoga 1162, FO-110 Tórshavn, Føroyar
Tlf. 311944, Fax. 311946, E-postur: oiladm@ofs.fo, www.oms.fo